– trygt og ómakaleyst til hús



# Frálíkar íbúðir í Blómubrekku

**Vil tú búgva væl og ómakaleyst í góðum umhvørvi, so eru nýggju og sera snøggu íbúðirnar í Blómubrekku ein góður møguleiki.**







Íbúðin liggur á ovastu hædd. Í íbúðuni er durur, bryggers / vaskirúm, stova og køk í einum, gongd, hjúnaðarrúm, kamar, wc við brúsu. Umframt eitt stórt og gott ovastaloftið ið er vælegnað til goymslu. Út frá stovuni er útigólv / altanur við útsýni yvir Havnina og fjørðin.

**Fakta**
**Blómubrekka 12V, Tórshavn**
**Byggiár:** 2005
**Gólvvídd:** 77 m2
**Prísuppskot:** kr. 1.500.000

## Uttanfyri

Tú koyrir niðan eftir Sundsvegnum, snarar til vinstru eftir Mylnuna og inn í Blómubrekku og síðani aftur til høgru. Økið er alt liðugt gjørt – snøgt og snotiligt. Allastaðni eru felags øki og parkeringspláss, og stutt er oman í býin við øllum hugsandi møguleikum og tænastum. Íbúðarhúsini standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við blindan veg. Blómubekka er sera "attraktivt" stað fyri bæði ung sum eldri við einum vælvirkandi eigarafelag, ið m.a. skipar fyri tiltøkum og viðlíkahaldi. Handil / bakarí er beint við eins og sera gott busssamband og dagstovnur / býlingshús, men annars er stutt til gongu oman í Gundadal og miðbýin. Frálíkt útsýni er oman yvir Havnina og út á fjørðin. Íbúðirnar eru nýggjar, og hartil eru bygningarnir júst klæddir og bálvaðir, so teir eru sera væl vardir ímóti kulda og vætu.



Onnur íbúðin hevur svalagongd og altan, og hin hevur útigólv.

## Innanfyri

Komin inn varnast tú straks, at her er talan um dygd. Vindeyguni eru stór, so tú fært nógv ljós inn. Út frá stovuni kanst tú fara út á svalan, altanin ella terassuna, so tú kanst njóta útilívið. Rúmini eru snøgg og ljós, hugnalig og fjálg, og íbúðirnar eru alt í alt sera liviligar. Tað er ein fragd at seta innbúgvið inn í slíkar karmar, og tær nýtist einki at gera. Alt er sum tað eigur at vera. Onnur íbúðin hevur gott pláss á ovasta lofti við tøttum tróðri, og har er gott pláss at goyma. Betonveggir eru millum íbúðirnar og betondekk er millum hæddirnar, so ikki hoyrist millum. Íbúðirnar eru sera væl hildnar og so væl viðfarnar, at tær at kalla eru sum nýggjar.







Íbúðin er í niðastu hædd, og er tí eisini væl egnað til rørslutarnað. Har er inngongd, durur, køkur / borðsstova / stova, kamar, millumgongd / skápsgongd, hjúnarrúm, baðirúm. Uttan fyri hurðina er snøgt útigólv / terassa, og útsýni er út á fjørðin.

**Fakta**
**Blómubrekka 42, Tórshavn**
**Byggiár:** 2005
**Gólvvídd:** 77 m2
**Prísuppskot:** kr. 1.600.000

PF INNI
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**